Starv

Lastbilmekanikari til bilverkstaðið

Strandfaraskip Landsins søkja við hesum eftir lastbilamekanikara til bilverkstaðið at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðsuppgávurnar hjá bilverkstaðnum
Høvuðsuppgávan hjá bilverkstaðnum er at umvæla, samskipa og menna tekniska viðlíkahaldið av lastbilum, bussum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni.

Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Tryggja ein støðugan rakstur av koyriútbúnaðinum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir- og ætlanir
- Gera ætlanir um størri viðlíkahaldsarbeiði
- Hava dagligt eftirlit við koyriútbúnaðinum, herundir samstarv við Bileftirlitið, verkstød og aðrar myndugleikar

Strandfaraskip Landsins hava 15 lastbilar, 10 bussar, 7 vørubilar, 31 viðfestisvognar og annan útbúnað.

Á bilverkstaðnum eru ialt 8 fólk.

Starvið fevnir um
Vanligt viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, bussar o.a. útbúnað.

Førleikakrøv
- Lastbilamekanikari ella tilsvarandi mekaniska útbúgving
- Stóra koyrikortið er ein fyrimunur
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

Setanartreytir
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálstýrið og Starvsmannafelagið, og er starvið lønt í lønarflokki 3.

Umsóknir
Áhugaðir mekanikarar skulu senda umsókn til:

Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15 juni 2001.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heðin Mortensen, leiðara á bilverkstaðnum tlf. 34 30 00 lokal 146, ella e-post: hem@ssl.fo

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krav um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstraretlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 opera-tørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Tvingsilssøla

Hósdagin 28. juni 2001, kl. 9.15 verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 858 b, Tvøroyri.**

Ognin er eini sethús í tveimum hæddum á 147 m² gjørd av betong og timbri. Húsini eru takt við eterniti. Í kjallarahæddini er fýrrúm og kjallararúm. Í stovuhæddini er durur við hjalli, gongd, køkur, stova, 3 kømur, baðirúm umframt 1 óinnrættað rúm.

Húsini eru vælhildin uttan sum innan, túnið er partvíst lagt við flísum. Húsini hava gott útsýni.

Støddin á grundøkinum er 1057 m² samb. tingblaðnum.

Sølan er umbiðin av **Fríðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145 (j. nr. 20010305)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

30.5.01
Færøernes fogedret

Suðuroyingar!
Útsetta skeiðið
til
Buss
Lastbil
Trailara
byrjar
á Drelnesi
mánaðu 18. juni kl. 20.00
(um nóg nógv teina seg)
SP/F Koyrikortið
Tórshavnar Trafikkskúli
Stoffalág 82
Tel 318821 • 315298
Fartel 218777

Sosialurin

FARTELEFONIR
GSM - NMT 450
Tráðleysar telefonir o. a.
Ymisk merki, so sum:
MOTOROLA
ERICSSON NOKIA CONNECTING PEOPLE
SIEMENS BENEFON
SØLA & TÆNASTA
Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

GEARKASSI
til Nissan Bluebird V11 til sølu.
Tlf. 214645

TOYOTA HIACE 2.4
Ein 1 ára gamal hvítur Toyota Hiace 2.4 Turbo diesel 4 wd til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin hevur koyrt 13.000 km.
Tlf. 213323, 321304 ella 313363

CITROEN XANTIA 1.9 TD
árg. 10/98, koyrt 80.000 km, er væl hildin til sølu.
Tlf. 251867 ella 332967 eftir kl. 17

VW POLO COUPE
classic, árg. 89, sera væl hildin, ongantið roykt í bilinum, 123.000 km, til sølu.
Tlf. 375133

TOPPSTYKKI
Eitt toppstykki ynskist til keyps til ein VW Transporter 1600 Turbo, frá 1986.
Tlf. 422145

SUMMARDEKK
Fýra sera góð summardekk 155/13 á felgum til sølu.
Tlf. 316447

NISSAN PATROL JEEPUR
árg. 86, stytra modellið, hevur ymisk brek. Kostnaður uml. 10.000 kr.
Tlf. 316946

KRÓKUR
til Ford Escort bíliga til sølu, ongantið brúktur.
Tlf. 317583

GOTT KEYP
Til sølu vegna flyting er ein Opl Vectra 2.0 Turbo diesel, 4 ára gamal, koyrt 75.000 km, metalblávur, CD-spælari, sportfelgur, fýra nýggj pikadekk á felgum við í keypinum. Prísur 135.000 kr.
Tlf. 421257 ella 253406

MITSUBISHI PAJERO
4 x 4 stuttur. Motorur og gearkassi ok, plátudeilir rustaðir, ramman ok.
Tlf. 318951 ella 215200

PÍKADEKK
13" pikadekk á felgum bíliga til sølu. Bert brúkt ein vetur.
Tlf. 318274

FORD ESCORT 1.8 D
árg. 90, nýsýnaður, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 254622 eftir kl. 19

VW GOLF
1.6 TD Intercooler til sølu, árg. 11/91, hvítur, senkaður og hevur spoilarsett, sær gott út.
Tlf. 373417

VW POLO
árg. 87 til sølu. Krevur smáar ábøtur.
Tlf. 225115 ella 457286

TOYOTA CAMRY 2.0 GLI
árg. 86, 107 HK til sølu.
Tlf. 321342

SPORTFELGUR
Fýra sportfelgur við lítið slitnum Good Year dekkum, 195/60 R15 2 x 5 hol, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 444677 ella 222544

BILAR TIL SØLU
Opel Vectra 2.0 expression.Citroen Saxo 1.5 diesel.
Tlf. 314018 ella 213727

OPEL KADET 1,6 LS
árg. 85, í góðum standi, til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 457136 ella 214216

TOYOTA CAMRY 2000GLI
árg. 86 til sølu, sýnaður december 2000 er í góðum standi. Prísur 14.000 kr.
Tlf. 218900

TIL SØLU
Ein aluminiums last til last, stødd: 4,60 x 2,23 til sølu.
Tlf. 441732/442166 ella 211732

NISSAN URVAN
árg. 86, diesel, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 281930

BMW 524 TD
árg. 89, hevur el-rútar, sóltak, el-spegl, er økonomiskur. Bilurin er vælhildin og nýsýnaður.
Tlf. 252072

NISSAN
Nissan Pick-up árg. 86 bíliga til sølu.
Tlf. 448913

OPEL ASCONA
Opel ascona 1.6s árg. 88 hevur koyrt 182.000 Í góðum standi hevur sóltak og sportsetur. Til sølu fyri uml. 14.000 kr.
Tlf. 421543 ella 250832

TIL SALG
Páhængsvogn, mærke Variant, længde 3.25 m, lastevne 500 kg, forhøjet sider.
Tlf. 447501

VØRUBILUR
Nissan vørubilur til sølu.
Tlf. 456868 ella 225200

TOYOTA COROLLA
Liftback, árg. 86, í góðum standi, sýnaður 2000, til sølu fyri ca. 10.000 kr.
Tlf. 219192 ella 255056

EYKADEILIR
til Nissan Sunny árg. 88, ynskist til keyps.
Tlf. 441642 eftir kl. 17

TOYOTA CARINA II 1.6
árg. 85 til sølu, møguliga til eykalutir, sýnaður í 2000.
Tlf. 252546

TOYOTA CARINA
Toyota Carina árg. 86, bíliga til sølu.
Tlf. 317775

SUMMARDEKK
Fýra góð Bridgestone summardekk stødd 185/15/55 fyri 1900 kr.
Tlf. 223980

FORD FIESTA 1.1 TIL SØLU
Ábøtur krevjast, hevur alu felgur við nýggjum dekkum + anhangari gjørdur úr einum Fiesta.
Tlf. 315713 eftir kl. 17

DEKK YNSKJAST
Fýra dekk, 155x12, ynskjast til keyps fyri sámuligan pris.
Tlf. 216089

4 PÍKADEKK
á felgum, passa til VW Polo, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 216089

Amboð

HMF KRANI
7 tons, sera bíliga til sølu.
Tlf. 223039

BORÐSAG
Næstan nýggj borðsag, nýprísur kr. 9.900,- til sølu fyri 6.500,-
Tlf. 212358

Arbeiði

ARBEIÐ YNSKIST
20 ára gomul genta ynskir arbeiði í Havn í summarfrítíðini t.d. á skrivstovu. Kann byrja 28. juni. Havi studentsprógv, teldukunnleika og koyrikort.
Ring 253071

TILBOÐ YNSKIST
at mála eini hús.
Ring 216240 ella 316240

HJÁLP SØKIST
Søkt verður eftir fólki til at mála eini betong hús.
Tlf. 313366

FITT GENTA SØKIST
til at passa hús, hestum og hundum uttanfyri Randers. Tú skalt helst ikki roykja ella drekka. Gott hevði verið, um tú ert yvir 20 ár og hevur koyrikort.
Tlf. 0045 86442082, Linda ella 444761

ARBEIÐI YNSKIST
16 ára gamal drongur ynskist arbeiði allan juli mánað, alt hevur áhuga.
Tlf. 317387

ARBEIÐI YNSKIST
21 ára gomul genta søkir eftur arbeiði í miðstaðarøkinum. Alt hevur áhuga.email: aniol2000@hotmail.com
Tlf. 361379

FITT GENTA SØKIST
til at passa hús, hestar og hundar uttan fyri Randers. Tú skalt helst ikki roykja ella drekka. Gott hevði verið um tú ert yvir 20 ár og hevur koyrikort. Tlf. 004586442081 spyr eftir Lindu
ella tlf. 444761

KIOSK FÓLK SØKIST
Tilkomið fólk søksit til Kiosk Steinatún at byrja 1. juni. Treytin má vera, at tú ert fyrikomandi, røsk/raskur og sjálvstendug/ur.
Tlf. 318320, spyr eftir Súsannu

ARBEIÐI YNSKIST
hálva tíð, av 25 ára gomlum arkitekt stu. helst seinnapartar, kvøld ella nátt.
Tlf. 212127

Barnaansing

ER NAKAR
ið kann passa dóttir mína sum er 6 ár, fulla tíð, til at byrja skjótast gjørligt. Fyrimun um tað er uppi undir VarðaEg eri at hitta á
tlf: 447160/310753

Barnaútgerð

BLÁUR
Bláur Simo barnakoyristólur við regnslag til sølu fyri 2.300 kr. Britax bilstólur til sølu fyri 400 kr. Góðg. 9-18 kg.
Tlf. 318975

TIL SØLU
Ljósagrá leðurlook babylift kr. 200,- Skrástólur kr. 200,-
Tlf. 318014

SIMO BARNASTÓLUR
Myrkagrønur Simo barnarstólur til sølu fyri 2500 kr., koyriposi fylgir við. Lítið brúktur.
Tlf. 310411 e. kl. 18.00

TIL SØLU
Myrkagrønur Brio barnavognur til sølu vegna flyting.
Tlf. 375445

BRIO KOYRISTÓLUR
leðurlook, 1800 kr. Puslibørð við skuffum 500 kr. Bilstólur 0-13 kg. 500 kr. Skrástólur 200 kr. Bert brúkt til 1 barn.
Tlf. 222682/372008

Bátaútgerð

BÁTAR TIL SØLU
Glastrevjabátur - 5 m langur við Johnson 25 hk páhangara í góðum standi, umframt vognur til sølu.
tlf. 31 86 57 og 31 10 38

5-MANNAFAR TIL SØLU
5 mannafar gjørt úr glastrevju, hevur skvatlibørð, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 315090

YNSKIST TIL KEYPS
Ein páhangsmotorur 25-60 hestar ynskist.
Tlf. 252521

BRIO KOYRISTÓLUR
leðurlook, 1800 kr. Puslibørð við skuffum 500 kr. Bilstólur 0-13 kg. 500 kr. Skrástólur 200 kr. Bert brúkt til 1 barn.
Tlf. 222681/372008

Bingo

SUÐUROYINGAR
Rimmar bingo verður í skúlahøllini mánakvøldið 11 juni kl. 19.00. Hvørt bingo gávukort á kr. 500. Høvuðsvinningur á lutaseðli harmonikuferð fyri 2 viðNorrønu.
Tvøroyrar Svimjifelag

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í Framtíðini onskvøldið 6. mai kl. 19.30. Hvørt bingo 300 kr. á lutaseðli m.a. 2 ferðir 500 kr. uttanlandsferð við Norrønu. Drigið verður millum søglini. Eykaspæl verður.
KFUM-skótarnir í Vági

BÁRUBINGO
Heimabingo fæst til keyps á posthúsinum og í sølubúðum um alt landið, tú sært beinanvegin um tú hevur vunnið.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

BINGO
Gott bingo verður í TB-húsinum tórsdagin 7. juni kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 11.junikl 19. Nógvir góðir vinningar.Full pláta 300 kr.Øll eru hjartaliga vælkomin.Glæman

Burturm. /funnið

INEX GENTU-UR
gloymt eftir í svimjihøllini hósdagin 10. mai. Hevur blanka reim við einari bláari perlu og einum hjarta á. Finningarløn verður latin.
Tlf. 310577 ella 222959

MØTTIL BURTURMISTUR
Svartur møttil tikin feil á landsdansistevnu 19.5. í Ítróttarhøllini á Nabb. Mín egni hevur fasta hettu, møtlaspenni v/knappamynstri og navn í fóðrinum. Eg havi fingið skeivt ein við leysari hettu og sama møtlaspenni.
Ringið 311966/318813

FUNNIÐ
Ein biblia funnin í Havn.
Tlf. 315268

Býli

ÍBÚÐ Í KBH.
Íbúð í KBH til leigu frá 15.6. til 20.8.
Tlf. 38119923 ella 25382911

ÍBÚÐ YNSKIST
Eitt friðarligt mannfólk søkir íbúð í Havn. Helst nærhendis handilsskúlanum.
Tlf. 321820

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt ungt par sum søkja eina íbúð á Skálafjørðinum skjótast gjørligt. Max. 3500 kr. um mánaðin við el og hita.
Vinarliga ring 226090

HJÁLP
Ungur maður ynskir kamar skjótast gjørligt. Hvørki roykir ella drekkur, eri friðarligur og fari væl um.
Tlf. 223040

KAMAR Í LEIRVIK
Kamar ynskist til leigu í Leirvík.
Tlf. 219997

AALBORG
Íbúð til leigu í juli og august.
Tlf. 317583 ella 0045 98152447

KØMUR Í VÁGI
til leigu.
Tlf. 217335

KOKKEDAL-TÓRSHAVN
Raðhús við øllum hentleikum ynskjast umbýtt við hús ella íbúð í Havn í tíðarskeiðinum 18.6. til 7.7.01. Kokkedal liggur 25 km. norðan fyri Keypmannahavn og sostatt nær við baðistrendur. Vinarliga ringið
20166316 ella 86125554

ÁRHUS-TÓRSHAVN
Vit hava eina 4-rúms íbúð mitt í Árhus og vilja fegin býta um við eini hús ella rúmliga íbúð í Havn frá 18.6. til umleið hálvan august. Íbúðin er nýmótans við øllum hentleikum og ikki langt frá baðistrond. Vinarliga ringið ella faxi
0045 86125554

FRIÐALIG
ung kvinna søknast eftir íbúð miðskeiðis í Havnini frá 1. juli ella seinni.
Tlf. 332119

KEYPMANNAHAVN
Sera góð og stór íbúð mitt í Keypmannahavn við øllum hentleikum til leigu frá 1. juli - 1. august. Kostnaður kr. 4.200,-.
Tlf. 0045 35 35 24 03

HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST
Ungt par uttan børn, bæði við føstum starvi, søknast eftir íbúð ella húsi at leiga í Tórshavnar kommunu frá hálvum august ella 1. september 2001.
Tlf. 316434

Í SANDOYNNA AT FERÐAST
So eru stór og góð hús við øllum hentleikum í Skopun til leigu. Húsini eru vælegnað til bólkar. Nærri frættist á
tlf. 361417 ella 361334

HÚS ELLA ÍBÚÐ
4 eldri íslendskar damur søkja hús ella íbúð til leigu frá 27. til 30. juli.
Tlf. 322373

TRÚGVANDI
friðarlig fólk ynskja íbúð í Havn. Fast arbeiði, gjalda rættstundis, roykja ikki.
Tlf. 316219

HÚS ELLA ÍBÚÐ
Par við 3 børnum søknast eftir íbúð/húsum skjótast møguligt, max. 5.500 við hita.
Tlf. 251397 eftir kl. 18

KØMUR TIL LEIGU
2 kømur til leigu í íbúð á Østerbro í København frá 1. juli 2001. Felags stova, køkur, bað/wc, vaskimaskina

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki